# Føroya Tele gott fyrra hálvár

Avlopið á rakstrinum hjá Føroya Tele var 22,7 milliónir krónur eftir skatt fyrra hálvár 2007. Nevndin í Føroya Tele hevur viðgjørt hálvársroknskapin á fyrsta nevndarfundinum eftir summarfrítíðina, og nevnd og leiðsla eru nøgd við gongdina, skrivar Føroya Tele í tíðindaskrivi. Um hendan gongdin heldur fram restina av árinum, verður ársúrslitið í 2007 betri enn í 2006, tá Føroya Tele hevði 26,7 milliónir krónur í avlopi eftir skatt. Nettosølan fyrra hálvár í ár var 172 milliónir krónur, og tað eru 13,5 milliónir krónur meira enn fyrra hálvár 2006, tá nettosølan var 158,5 milliónir krónur.





# Valúrslit við einum valdømi

**Hvat hevði hent, um vit fingu eitt valdømi í staðin fyri sjey. Tað hevði ikki broytt tað stóra millum flokkarnar í fyrstu syftu. Men tað hevði havt við sær stórar broytingar fyri persónsvalið. Sambandsflokkurin hevði gingið eitt sindur aftur. Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eitt sindur fram**

VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*
*samfelagsfrøðingur*

Í veljarakanningini, ið varð gjørd fyri einari viku síðani, vórðu fólk spurd bæði, hvat ið tey høvdu valt undir galdandi valskipan, og hvat ið tey høvdu valt, um landið varð umskipað til eitt valdømi. Tað gav nakrar munir. Men teir vóru ikki stórir; allir niðanfyri prosentið. Sambandsflokkurin vildi við einum valdømi fingið gott hálvt prosent minni, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin knapt hálvt prosent meira. Annars hevði ikki hent tað stóra. Annað enn at millum hálvt og heilt prosent høvdu valt at sitið heima í staðin fyri at farið á val.

**Meira enn triðingurin hevði atkvøtt fyri øðrum persóni**

Í kanningini vórðu fólk eisini spurd, um tey høvdu atkvøtt fyri sama persóni sum á seinasta løgtingsvali, um Føroyar vórðu skipaðar sum eitt valdømi. Góður triðingur ætlaði sær tað, men knappliga 40 prosent, søgdu nei. Serliga var tað í Sandoynni, at veljararnir ikki høvdu hug at atkvøða fyri sama persóni sum á seinasta vali, um Føroyar vórðu skipaðar sum eitt valdømi – heili 70 prosent.

**Meira enn helvtin hevði umhugsað at atkvøtt fyri valevni í øðrum parti av landinum.**

Fólk vórðu síðani spurd, um tey høvdu umhugsað at atkvødd fyri persóni, sum á seinasta vali var uppstillaður í øðrum valdømi.

Her svaraði meira enn helvtin, at tað kundu tey væl funnið uppá. Her vóru fólk toluliga samd kring tað mesta av landinum. Alla aðrastaðni enn í Norðoyggjum. Í Norðoyggjum var tað minni enn triðingurin, ið kundi hugsað sær at farið út um verandi valdømi við sínum krossi. Ein helvt segði kortanei. Tey vóru somuleiðis rættuliga nógv, ið søgdu nei í Suðuroy. Knappliga fjøruti prosent. Her var kortini eins og í restini av landinum ein greiður meiriluti, ið kundi funnið uppá at atkvøtt fyri valevni uttanfyri oynna.

| % | Ja | Nei | Atkvøði ei pers. | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 57,7 | 38,5 | 3,8 | 100,0 |
| Sandoy | 61,1 | 22,2 | 16,7 | 100,0 |
| Suðurstreymoy | 57,1 | 29,3 | 13,6 | 100,0 |
| Norðurstreymoy | 60,0 | 28,6 | 11,4 | 100,0 |
| Vágar | 64,3 | 23,8 | 11,9 | 100,0 |
| Eysturoy | 59,8 | 25,0 | 15,2 | 100,0 |
| Norðoyggjar | 30,4 | 50,0 | 19,6 | 100,0 |
| **Alt landið** | 56,3 | 30,0 | 13,7 | 100,0 |

| Munur í %-visu undirtøku | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 0 |
| Sambandsflokkurin | -0,6 |
| Javnadarflokkurin | 0,4 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 0,3 |
| Tjóðveldisflokkurin | -0,1 |
| Miðflokkurin | -0,1 |
| Hin Stuttligi Flokkurin | -0,2 |
| Blankt | -0,3 |
| Ikki á val | -0,7 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 1,2 |

| % | Ja | Nei | Atkvøddi ei pers. | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 46,2 | 42,3 | 11,5 | 100,0,0 |
| Sandoy | 23,5 | 70,6 | 5,9 | 100,0,0 |
| Suðurstreymoy | 37,4 | 36,8 | 25,7 | 100,0,0 |
| Norðurstreymoy | 35,1 | 32,4 | 32,4 | 100,0,0 |
| Vágar | 34,9 | 48,8 | 16,3 | 100,0,0 |
| Eysturoy | 29,0 | 37,6 | 33,3 | 100,0,0 |
| Norðoyggjar | 47,7 | 40,9 | 11,4 | 100,0,0 |
| **Alt landið** | **36,5** | **39** | **24,4** | **100,0,0** |